# Jólating

**Oljutingið bjóðar til Jólating 6. desember 2005 kl. 19.00 á Hotel Føroyum, har Trond Unneland, stjórin í Chevron Danmark heldur fyrilestur undir heitinum:**

## Oljurisin Chevron

Chevron er ein av nýggju fyritøkunum á føroyska landgrunninum. Chevron er eisini fyristøðufelag í samtakinum, sum fann olju á Rosebank/Lochnagar leiðini á bretska landgrunninum tætt við føroyska markið seinasta summar, og kemur Trond í sínum fyrilestri serliga at leggja dent á møguleikarnar á Atlansmótinum.

Trond Unneland, sum hevur drúgvar royndir frá oljuídnaðinum, hevur starvast hjá Chevron síðani 2000. Áðrenn tað arbeiddi hann í 16 ár hjá Statoil. Trond Unneland er reservoir verkfrøðingur og hevur eina PhD í oljuverkfrøði frá universitetinum í Tróndheimi.

Kl. 19.00 Vælkomin
Kl. 19.30 Formaðurin setur Oljutingið
Kl. 19.35 Trond Unneland røðar um evni : Oljurisin Chevron
Kl. 20.20 Spurningar frá áhoyrarum
Kl. 20.30 Matur og drekka
Kl. 21.30 Liðugt

Chevron stuðlar tiltakinum.

Nýggir limir kunnu tekna seg hjá Vinnuhúsinum ella á Jólatinginum.

Vinarliga boða Vinnuhúsinum frá luttøku í seinasta lagi 2. desember á telefon 309900 ella umvegis teldupost: industry@industry.fo

Vælkomin

Vinarliga
**Oljutingið**

OLJUTINGIÐ
Petroleum Association of the Faroe Islands

Sosialurin 341800

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Barnaansingin í Tórshavnar Kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Býlingshúsið undir Fjalli eftir:**
- einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna til vøggustovuna at byrja 1. februar 2006 ella eftir nærri avtalu.
- tveimum pedagogum at arbeiða 30 tímar um vikuna til barnagarðin nýggjustovu at byrja 1. februar 2006 ella eftir nærri avtalu.
- tveimum pedagogum at arbeiða 30 tímar um vikuna til barnagarðin gomlustovu at byrja 1. februar 2006 ella eftir nærri avtalu.

Pedagoglesandi, ið verða liðug í februar 2006 eru vælkomin at søkja.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Samstarv**
Býlingshúsið undir Fjalli hevur eitt tætt samstarv við Heimið fyri minnisveik í Vallalíð.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Gittu á Kák, stovnsleiðara, tlf. 318525.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Býlingshúsinum undir Fjalli, Fjalsgøta 25, FO-100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 16. januar 2006.



**Býlingshúsið undir Fjalli**

Í býlingshúsinum eru 3 stovur 2 barnagarðs-stovur og 1 vøggu-stova við tilsamans 52 børnum og 12 starvs-fólkum.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

SEV

# Umboðsnevndarfundur

**Hervið verður boðað til heystfundin hjá SEV. Fundurin verður á Hotel Føroyum, týsdagin 6. desember 2005 kl. 9.30.**

Sambært 4. gr., stk. 13 í viðtøkunum fyri SEV er skráin fyri fundin hendan:
a. Frágreiðing frá stýrinum um felagsins virksemi síðani ársfundin.
b. Kunning frá stýrinum um fíggjargongdina síðani ársfundin.
c. Uppskot til fíggjarætlan fyri komandi rakstrarár til góðkenningar.

Áðrenn farið verður undir formligu skránna sambært viðtøkunum, er ætlanin at hava nakrar fram-løgur frá fólki uttanfyri SEV. Ætlanin er at umrøða viðurskifti, sum eru av stórum týdningi fyri elfelagið.

**Rakstrarleiðarastarvið**
Tá umboðsnevndin 19. mars 2004 samtykti broytingar í viðtøkunum fyri SEV varð ásett, at stýrið hjá SEV eftir tilmæli frá stjóranum setir rakstrarleiðaran. Lýsing hevur verið í bløðunum, har søkt verður eftir rakstrarleiðara.

Rakstrarleiðarastarvið er sera týdningarmikið starv, tí talan er um tann persón, sum hevur evstu ábyrgdina av, at trygdarviðurskiftini í SEV eru í lagi. Rakstrarleiðarin hevur ábyrgdina av at ansa eftir, at SEV lýkur krøvini, sum eru ásettar í regluverkinum á økinum, herundir sterkstreymsreglugerðini.

Per Ankerstjerne arbeiðir sum ráðgevi hjá Dansk Energi. Hann arbeiðir millum annað við at ráðgeva donskum elveitingarfyritøkum um hesi viðurskifti, og hann fer á umboðsnevndarfundinum at greiða frá høvuðsreglunum, sum eru galdandi á økinum.

**Hetta er eisini gott høvi hjá møguligum umsøkjarum at fáa eitt prát við Per Ankerstjerne um krøvini, sum eru galdandi fyri starvið sum rakstrarleiðari.**

**Nýggj fíggjarætlan**
Fíggjarætlanin fer nú at verða gjørd á ein annan hátt enn áður.

Stýrið hevur tikið avgerð um at gera fíggjarætlanina hjá elfelagnum á ein slíkan hátt, at fíggjarætlanin verður við til at økja gjøgnumskygnið og opinleikan í elfelagnum.

Seinni er ætlanin at seta fíggjarætlan og roknskap soleiðis upp, at framleiðsla, býtisvirkir og fyrisiting verða skild sundur roknskaparliga. Hetta skuldi eisini borið við sær størri gjøgnumskygni.

Grannskoðarar frá Rasmussen og Weihe fara á fundinum at greiða frá nýggju fíggjarætlanini, og hvussu hon er gjørd.

**Nýggj elveitingarlóg**
Landsstýrið arbeiðir fyri tíðina við uppskoti til nýggja elveitingarlóg. Tað er Oljufyrisitingin, sum hevur uppgávuna um hendi. Hetta er sjálvsagt eitt sera týdningarmikið mál fyri SEV.

Sigurð í Jákupsstovu, stjóri í Oljufyrisitingini, hevur játtað at koma á umboðsnevndarfundin at greiða frá arbeiðinum at gera nýggja elveitingarlóg.

**Vegleiðandi tíðarætlan fyri fundin**
Kl. 9.30 Umboðsnevndarformaðurin býður vælkomin.
Kl. 9.40 Per Ankerstjerne greiðir frá reglum um rakstrarleiðara.
Kl. 10.40 Grannskoðarar frá Rasmussen og Wheie greiða frá fíggjarætlanini.
Kl. 11.40 Sigurð í Jákupsstovu greiðir frá arbeiðinum við nýggjari elveitingarlóg.
Kl. 12.30 Steðgur.
Kl. 13.30 Frágreiðing frá stýrinum um felagsins virksemi síðani ársfundin.
Kl. 14.30 Kunning frá stýrinum um fíggjargongdina síðani ársfundin.
Kl. 15.00 Uppskot til fíggjarætlan fyri komandi rakstrarár til góðkenningar.

Fundurin er almennur. Øll eru vælkomin.

Vinaliga

Hans Tausen Olsen,
umboðsnevndarformaður

Elfelagið
SEV

Sosialurin 341800

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo